LANDSVERK
byggir land

Tinghúsvegur 5, FO-100 Tórshavn. Tlf. 340 800. lv@lv.fo. www.lv.fo

Góðskutryggjað **ASFALT**

Asfaltverkið
við royndunum

Í fleiri áratíggju hevur Landsverk framleitt fleiri hundraðtúsund tons av asfalti til nógv ymisk endamál. Hesa tíðina hava vit vunnið okkum royndir og vitan, sum í dag koma brúkarunum til góðar, tá ið teir skulu velja tað rætta asfaltið.

Eitt framkomið asfaltverk í Hundsarabotni framleiðir asfalt til ymisk endamál – vegir, havnir og ídnaðarøkir, gongubreytir og tún. Vit selja bæði standardvørur og sergjørdar vørur til størri og smærri keyparar.

Hjá Landsverki er øll asfaltframleiðsla góðskutryggjað. Asfaltið verður framleitt eftir góðkendum uppskriftum. Allir liðir í framleiðsluni verða eftirkannaðir sambært altjóða krøvum. Sostatt kann brúkarin vera rættuliga vísur í, at asfaltið tænir sínum rætta endamáli og heldur væl.

Okkara vørur

Standard vørur: Tað finnast fleiri sløg av asfalti, alt eftir hvat tað skal brúkast til. Taka vit ein vanligan veg, so hevur hann ofta trý løg av asfalti. Niðast er eitt berilag. Omaná liggur eitt bindilag og ovast eitt slitlag. Tey ymsu løgini verða gjørd eftir ymiskum uppskriftum og við ymiskum støddum av steinum.

Tað finnast fleiri sløg av beriløgum, bindiløgum og slitløgum. Samansetingin veldst m.a. um, hvussu stór ferðslan er á staðnum, sum skal asfalterast.

Serligar vørur: Umframt standardvørurnar selja vit serframleiddar vørur, sum verða gjørdar eftir ynskjunum hjá viðskiftafólkunum. Tað ber í flestu førum til at framleiða vørurnar, sum kundin biður um. Tó er neyðugt at bíleggja í góðari tíð.

Tvørskurður av asfalti



Slitløg finnast sum AB og SMA. AB stendur fyri asfaltbetong og verður brúkt á vegum við nógvari ferðslu. SMA stendur fyri skervmastix, og er sermerkt fyri at verða slitsterkt. SMA verður brúkt til vegir við nógvari og tungari ferðslu.

Úrvalið av slitløgum er hetta:

AB 4
AB 8
AB 16
AB 16, við 35% av ljósum tilfari (durasplitt-steinar)
AB 16 við 30% av ljósum tilfari (durasplitt-steinar)
SMA 8
SMA 12 við 45 % av ljósum tilfari
SMA 16
SMA 16 við 55 % av ljósum tilfari

Slit- og bindiløg finnast sum AGB, sum merkir asfaltgrúsbetong. Hettar er asfalt, sum verður brúkt til vegir við minni ferðslu.

Úrvalið av slit- og bindiløgum, har ÁFS (ársferðsla um samdøgrið) er minni enn 3000, er hetta:

AGB 8
AGB 16

Berilagið finst sum AG, sum merkir asfaltgrús. Berilagið er gjørt soleiðis, at tað tekur trýstið frá tungu akførunum.

Úrvalið av beriløgum:

AG 16
AG 22

Oljugrús. Vit framleiða eisini OG, sum stendur fyri oljugrús. Oljugrús verður latið sum OG 8.

Endamálið avger asfaltið

Hvørji sløg av asfalti, tú skal keypa, valdast endamálið, asfaltið skal nýtast til. Í summum førum er neyðugt við bæði berilagi, bindilagi og slitlagi. Í øðrum førum er kanska nóg mikið bert við einum slitlagi.

Ert tú í iva um røttu samansetingina, ert tú vælkomin at venda tær til Asfaltverkið í Hundsarabotni. Vit eru altíð til reiðar at veita ráðgeving um, hvat slag av asfalti tørvur er á.

Í hesum yvirlitinum hava vit sett upp trý tey vanligastu endamálini, sum asfaltið verður nýtt til.

Havnarløg og ídnaðarøkir:

Slitlag:
SMA
AB

Bindilag:
AGB 8
AGB 16

Berilag:
AG 16
AG 22

Kommunalir vegir:

Slitlag:
AGB: Um ferðslan er undir 3000 bilar um samdøgrið.
AB: Um ferðslan er meira enn 3000 bilar um samdøgrið.

Bindilag:
AGB 8
AGB 16

Berilag:
AG 16
AG 22

Gongubreytir og tún:

Slitlag:
AGB

Vel røttu **tjúkdina**

Áðrenn tú keypir asfalt, er umráðandi, at tú finnur fram til, hvussu tjúkt asfaltið skal vera. Tað kann vera freistandi at koyra eitt so tunt lag á, sum til ber, fyri at spara. Men tað kann lættliga blíva ein sparing eftir hæli.

Ikki ber til at siga ein prís fyri fermeturin fyrr enn avgjørt er hvør tjúkdin skal vera. Og tjúkdin verður vald eftir tilfarsblandingini, sum aftur er vald eftir hvat asfalti skal brúkast til.

Eitt asfaltlag skal vera minst tríggjar ferðir so tjúkt sum størsta steinstøddin í blandingini – og asfalt verður tynri, tá ið tað verður trumlað. Er lagið ov tunt, fært tú ikki røttu komprimeringina, og harvið heldur asfaltið nógv verri.

Talvan til høgru vísir lutfallið millum tjúkdina á asfaltinum og nøgdina av asfalti, sum skal til fyri at fáa ta valdu tjúkdina. Vatnrætti ásurin vísir tjúkdina í cm, og tann lodrætti ásurin vísir nøgdina, sum skal til.

Í døminum hava vit valt, at asfaltlagið skal vera 5,5 cm tjúkt, tá ið tað er liðugt trumlað. Far nú inn í talvuna í neðra við 5,5 cm og beina linju upp, har hon umskarast grafin og fylg so linjuni til vinstru, so sært tú, hvussu nógv asfalt, ið krevst.

Sum nakað nýtt, kunnu viðskiftafólkini nú sjálvi rokna út, hvussu nógv asfalt teimum nýtist, og hvussu nógv nøgdin fer at kosta. Far inn á heimasíðuna hjá Landsverki, www.lv.fo. Fyll út, hvussu langur og breiður vegateinurin er, hvat slag av asfalti, ætlanin er at brúka og hvussu tjúkt, tú ætlar at asfaltera. Legg merki til, at velur tú ov tunt asfalt, so ávarar skipanin um hetta.



DØMI: 140 kg/m2

A	Liðugt trumla	5,5 cm tjúkt
B	Maskinútlagt (áðrenn trumling)	6,0 cm tjúkt
C	Hondútlagt (áðrenn trumling	6,9 cm tjúkt

Góðskueftirlit - áðrenn og aftaná

Asfaltið, sum kemur úr Hundsarabotni, er framleitt á einum framkomnum asfaltverki eftir viðurkendum uppskriftum. Harafturat hevur Asfaltverkið í Hundsarabotni, sum einasti framleiðari av asfalti í Føroyum, eftirlit við øllum liðum í framleiðsluni.

Asfaltið verður kannað, bæði áðrenn og aftaná at tað verður lagt á.

Á Royndarstovuni í Hundsarabotni verða nógvar kanningar gjørdar. Millum annað verður kannað, hvussu sterkt asfaltið er, og hvussu væl tað tolir trýst. Evnistyngdin á skervinum og brotstyrkin í asfaltinum verða máld. Alt samalt eftir góðkendum forskriftum, har áralongu royndirnar eisini koma asfaltverkinum til góðar. Tá ið asfaltið er lagt á, verða somuleiðis stakroyndir tiknar av asfaltinum úti á vegnunum fyri at staðfesta góðskuna.



Jónleif Joensen, starvstovuleiðari, góðskutryggjar asfaltið frá Landsverki

Allir liðir í framleiðsluni verða skrásettir. Henda skipan ger, at vit alla tíðina kunnu halda eyga við, at asfaltið hevur tað bestu góðskuna og kunnu tryggja, at framleiðslan støðugt verður ment.

Við skrásetingini hevur Royndarstovan í Hundsarabotni eitt yvirlit yvir, júst hvat slag av asfalti, ið er nýtt á teimum ymsu vegateinunum kring landið. Hetta lættir munandi um hjá brúkarunum, tá ið nýtt asfalt skal leggjast á, ella ein vegateinur skal umvælast, tí tá vita vit nágreiniliga hvat slag av tilfari, ið skal nýtast.

Vanliga verður sagt, at asfalt heldur í 15 - 20 ár, alt eftir ferðslutíttleika. Tó eru fyrivarni, sum skulu takast fyri at asfalti skal halda so leingi.

Eitt nú er sera umráðandi at asfaltframleiðslan er í lagi og at rætta asfaltið verður valt til rætta endamálið. Undirlagið har asfalterað verður má verða sterkt, og vegurin verða rætt gjørdur. Áleggingin og ikki minst trumlingin av asfaltinum mugu vera gjørd á rættan hátt fyri at tryggja, at asfaltið ikki verður slitið upp ov skjótt.

Ráðfør teg **við okkum**

Vit vóna, at hesin faldari fer at hjálpa tær við at finna fram til tað rætta asfaltið. Asfaltið, sum svarar best til tín tørv.

At velja asfalt kann tó vera trupult og krevur umhugsni, serliga tá talan er um eina stóra framtíðaríløgu. Tískil er umráðandi, at tú kanst ráðføra teg við rey røttu fólkini, sum hava innlit og vitan í asfaltframleiðslu.

Ert tú í iva, hvat tú skalt gera, ert tú vælkomin at venda tær til Asfaltverkið í Hundsarabotni á tlf. 540 970 ella á jonleif@lv.fo. Har eru okkara serfrøðingar við teirra drúgvu royndum altíð til reiðar at veita tær góða vegleiðing, so at skil er í, tá ið tú gert eina íløgu í asfalt.